**Álit**
**í**
**løgtingsmáli nr. 1/2013**: **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur lagt málið fram tann 29. juli 2013, og eftir 1. viðgerð tann 2. august 2013 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 5., 7., 8. og 9. august 2013.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag, Meginfelag Útróðramanna, Vinnuhúsið, Fiskidaganevndina, Havstovuna, Fiskiveiðieftirlitið og Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Alfred Olsen, Hanus Samró, Jógvan Skorheim, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Janus Rein) hevur hesar viðmerkingar:

Undir viðgerðini av uppskotinum løgdu allir hoyringspartar herðslu á, at neyðugt er við støðugum kørmum um okkara fiskivinnu við ikki ov ógvisligum broytingum, so vinnan veit, hvat hon hevur at halda seg til og virka út frá.

Meirilutin mælir til, at Havstovan í størri mun brúkar eygleiðarar umborð á føroyskum fiskiskipum fyri á tann hátt at fáa eitt haldbetri grundarlag undir metingunum av fiskastovnunum undir Føroyum. Slík skipan kann eisini fremja betri samljóð millum Havstovuna og vinnuna.

Víst var eisini á, at fiskidagaskipanin, sum er tann skipanin, ið hóskar best til okkara blandings-fiskiskap undir Føroyum, skal regulerast, um ein effektivitetsøking er farin fram, og ikki eftir støddini á fiskastovnunum. Og tað er ikki talan um her, tí har skip og fiskireiðskapur eru vorðin effektivari, er talið á skipum og bátum minkað í størri mun.

Veiðitrýstið, ið vinnan hevur á botnfiskastovnarnar undir Føroyum er hóskandi til langtíðarjavn-vágina, sum ICES mælir til, men í løtuni mælir ICES til, at veiðitrýstið verður sett nakað lægri fyri toska- og hýsustovnarnar, tí at stovnarnir eru so illa fyri. Vinnan hevur tikið hetta atlitið til støðuna hjá toska- og hýsustovnunum og hevur lagt seg eftir at fiska á ytru leið á djúpum vatni undir Føroyum sambært. Yvirlitið frá Fiskiveiðieftirlitinum, á Íslandsrygginum, í Íslandi, Eysturgrønlandi og á Flemich Cap, og harvið er munandi minni roynd á innaru leið.

Meirilutin er samdur um, at tað í høvuðsheitinum eru línuskipini, sum hava útvegað okkum tey søguligu rættindini á Flemich Cap, og eiga tey tí sín lutvísa rætt til hesa kvotu. Fiskiskapurin hevur sum heild hepnast væl, har skipini hava fiskað væl, og allur fiskurin er landaður í Føroyum og virkaður á teimum føroysku fiskavirkjunum.

Meirilutin metir tað vera neyðugt, at hædd verður tikin bæði fyri støðuni hjá botnsfiskastovninum og støðuni hjá heimaflotunum. Tí mælir meirilutin til, at landsstýrismaðurin ger enn meira við at útvega heimaflotanum rættindi aðrastaðni, til støðan hjá botnfiskastovninum batnar, og heimaflotan hevur møguleika fyri at vinna pening.

Allir partar vóru samdir um, at tær serligu náttúrgivnu umstøður, sum hava gjørt seg galdandi í føroyskum sjóøki hesi seinastu árini við teimum øktu nøgdunum av uppisjóvarfiski, við tað at henda velduga mongdin av makreli, sild og øðrum uppisjóvarfiski, sum ikki er sædd áður, floymir inn á føroyskt sjóøki, hava sína stóru ávirkan á botnfiskastovnarnar undir Føroyum, við tað at makrelurin, ið etur alt, sum fyri kjaftin rekur, etur føðina, sum aðrir fiskastovnar, herundir toskur og hýsa, skulu liva av, er ein hóttan móti verandi fiskastovnum undir Føroyum.

Meirilutin er samdur um, at tvídrátturin millum vinnuna øðrumegin og Havstovan hinumegin, um ávirkanina av tí veldugu makrelnøgdini í føroyskum sjógvi, ger støðutakanina hjá nevndini trupla. Meirilutin mælir tí landsstýrismanninum til at skipa eitt greiningararbeiði, hvørs endamál er at fáa greiði á, hvørji páhald eru best grundað ella sonn, og har fiskivinnan verður ein aktivur partur av greiningararbeiðinum.

Tilgongdin í toskastovninum er lítil, og tí er toskastovnurin framvegis illa fyri, sjálvt um stórur niðurskurðir eru gjørdir í fiskidøgunum hjá øllum skipabólkum, og veiðitrýstið á stovnarnar er tað, sum mælt verður til.

Hýsustovnurin er framvegis lítil og illa fyri, men útróðrarmenninir vístu á, at tekin vóru um, at støðan hjá hýsuni var eitt vet betri í ár enn undanfarin ár, og roknaðu við, at nakað av hýsu fór at vera at fáa í heyst og vetur.  Men hvør orsøkin er, ella um tað er nøkur ávís orsøk fyri, at lítil og eingin tilgongd er av hýsu og toski, kundi eingin við vissu siga. Men at tann ovurstóra nøgdin av makreli í føroyskum havøki, bæði inni við land og úti á víðum havi, hevur sína ávirkan á tí ringu støðuna, tað vóru øll samd um.

Føroyar eiga tí, við atliti til onnur fiskasløg, at fiska makrel í neyðugum nøgdum, so vit ikki uppliva eitt kollaps av toska-, hýsu- og øðrum fiskastovnum undir Føroyum.

Undir viðgerðini av uppskotinum, varð viðgjørt tey nógvu friðaðu økini undir Føroyum, og hvørja ávirkan hetta hevði fyri fiskastovnarnar. Her vóru dømir um, at á upsaøkjum, sum høvdu verið stongd og latin upp aftur, var fiskur at fáa, meðan flatfiskaøkir, sum høvdu verið stongd og nú latin upp aftur, nú vóru púra oyðin, sjálvt um fiskur var har, tá økið var stongt.

Vinnan vísti á, at best hevði verið at latið upp fyri avmarkaðum royndarfiskiskapi á teimum stongdu leiðunum fyri at kunna fylgja við í, hvat hendir á hesum økjum.

Umsitingarætlanin, sum var framløgd á heysti 2011, vísti, at veiðitrýstið fyri hýsu er í samsvari við tilráðingarnar, og at mett verður, at tær reguleringar, ið longu eru gjørdar fyri tosk, og tillagingin av veiðitrýstinum eisini fara at gagna hýsustovninum. Somuleiðis leggur umsitingarætlanin upp til, at tað ikki skal vera neyðugt at stilla fiskidagar o.a. á hvørjum ári. Tað skal bert gerast, um gongdin yvir ávíst áramál vísir, at veiðitrýstið eigur at stillast av nýggjum.

Ein part av umsitingarætlanini er tillagingarskipan, sum skal nýtast, tá ið stovnar eru undir minstu ráðiligu støði. Havstovan nýtir hesa tillagingarreglu sum grundarlag undir sínum tilmæli í ár.

Meirilutin mælir til at seta brúksskyldu í gildi longu komandi fiskiár, ið áleggur teimum, sum fáa fiskiloyvi, um at brúka fiskiloyvið í ásettan mun. Hetta kann vera við til, at tey, sum brúka sítt fiskiloyvi, fáa betri umstøðurt, meðan tey, sum ikki brúka fiskiloyvini,í ringasta føri kunnu risikera,

at tey ikki verða endurnýggjað. Brúksskyldan fer at vera við til at fora fyri, at óbrúkt fiskiloyvir brádliga verða virkin, tá fiskiskapurin batnar. Meirilutin er blivin kunnaður um, at avlopsdagarnir seinastu 3 árini í miðan eru í bólki 2: 541 dagar, bólki 3: 596 dagar, bólki 4A: 701 dagar, bólki 4B: 601 dagar, bólki 4T: 0 dagar, og bólki 5: 5.197 dagar. Meirilutin metir, at bæði umsitingarætlanin og brúksskylda kom at skapa stabilitet viðvíkjandi ásetingum av fiskidøgum, og eiga at vera ein parur av eini komandi lóg um vinnuligan fiskiskap.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur vegna samgonguna sett ein arbeiðsbólk, ið er mannaður av umboðum fyri allar flokkar og uttanflokkatingmannin á tingi, sum skal ganga alla loyvisskipanina ígjøgnum og gera uppskot um neyðugar broytingar. Endamálið við tí er at tryggja, at greiður ræðisrættur er knýttur at veiðiloyvum, fiskidøgum og kvotum, og skal arbeiðast fram ímóti, at regluverkið fyri loyvisskipanina verður greitt og einfalt at umsita.

Við støði í eini gjøgnumgongd av allari lógini um vinnuligan fiskiskap skal arbeiðsbólkurin gera uppskot til tekniska endurskoðan og tillaging við tí endamáli at tryggja, at lógin er greið og neyv, væl skipað og samanhangandi, og stuðlar undir einfalda umsiting.

Meirilutin er samdur um, at uppskotið um fiskivinnunýskipanina eigur at verða lagt fyri Løgtingið so skjótt sum gjørligt.

Út frá eini heildarmeting av teimum náttúrufyribrigdum, sum eru í føroyskum sjógvi í løtuni viðvíkjandi makreli og sild v.m., og tí vánaligu støðu, sum toska- og hýsustovnarnir eru í, mælir meirilutin til ein ávísan niðurskurð av teimum tillutaðu døgunum innan ávísar skipabólkar.

Í bólki 4A, 4B og 4T eru bert fá skip virkin, og hava tey í dag fáar fiskidagar, umframt at hesir bólkar brúka fiskidagarnar og hava avmarkaðar møguleikar til at tilogna sær fleiri fiskidagar, ella troyta aðrar fiskimøguleikar. Tí verður mælt frá at skerja hjá hesum bólkunum.

Meirilutin mælir til at skerja bólk 2 við 4 %, og verður hetta gjørt við atliti til støðuna í upsastovnninum. Hesin bólkur hevur eisini møguleika til at fiska makrel og sild um summarið. Meirilutin mælir til at skerja bólk 3 við 7 %, og verður hettta gjørt við atliti til støðuna í toska- og hýsustovninum. Meirilutin mælir til, at hesin bólkur skal framhaldandi hava rættindi til Flemish Cap, vísandi til góðu royndirnar í inniverandi fiskiári. Meirilutin mælir til at skerja bólk 5 við 7 %, og verður hetta gjørt við atliti til, at hesin bólkur fiskar nógvan smáan tosk, serliga tosk 5 og 4, sum talvan í skjali 2 vísir á, og fer ein skerjing í hesum bólki at hava ávirkan á veiðuna eftir ungfiski.

Meirilutin mælir til soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1 nr. 2 verður «4626» broytt til: «4441», «2567» broytt til: «2387», og ”10.607” broytt til ”9.865”.

**Viðmerkingar**

Bólkur 2, ið er partrolarar og lemmatrolarar, sum hava møguleika at fiska makrel og sild um summarið, verður skerdur við 4 % út frá støðuni hjá upsastovninum í løtuni.
Bólkur 3, sum er línuskipini, sum nú eisini hava rættindini til at fiska kvotuna á Flemich Cap, og bólkur 5, sum er útróðrabátar undir 15 tons, verður skerdur við 7 % við serligum atliti til støðuna hjá toska- og hýsustovninum.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Páll á Reynatúgvu og Aksel V. Johannesen) hevur lagt nógva orku í at finna breiða semju um hettar tilmælið til Løgtingið og er harmur um, at samgongan í evstu løtu gekk frá teirri semju, sum gjørd varð um fiskidagarnar. Vit meta støðuna hjá botnfiskastovnunum á Føroyagrunninum vera somikið hættisliga nú, at ítøkilig stig muga takast til at verja, serliga hýsu- og toskastovnin. Í veruleikanum er tað uttan týdning, hvør orsøkin er til vánaligu støðuna. Helst er ein samanrenning av hitaviðurskiftum í sjónum, av nógv øktari nøgd av uppisjóvarfiski og lutfalsliga stóra royndin á lítlu botnfiskastovnarnar orsøk til syndarligu støðuna.

Minnilutin hevur í áravís víst á, hvussu neyðugt tað er at útvega heimaflotanum aðrar fiskileiðir, eitt nú á Flemish Cap og í Barentshavinum, fyri at minka um trýstið á stovnarnar. Tað var eitt framstig, tá landsstýrismaðurin eftir stórt politiskt trýst valdi at loyva línuskipunum og trolarum at fiska á Flemish Cap. Uttan iva eitt kærkomið fíggarligt og vinnuligt íkast til flotan, sum eftir minnilutans tykki eigur at halda fram og leggjast í tryggar og varandi karmar. Tað er tó ein sannroynd, at verjan, sum Føroyagrunnurin kundi fingið burtur úr umskipanini av veiðirættindunum, ikki fær veruligt gagn, um politiska skipanin ikki samstundis ger sítt til at minka um veiðistrýstið á søguliga lágu stovnarnar av toski og hýsu. Leggjast skal afturat, at minnlutin metir vinnuna gera sítt til at umleggja trýstið á hýsu- og toskaleið við at fiska á ytri leiðum.

Staðfestast kann eisini, at útflutningsvirði Føroya kundi verið millum hálva og heila milliard krónur størri, um botnfiskastovnarnir vóru á vanligari stødd.

Fyri samfelagið er neyðugt, at vit bjarga bæði botnfiskastovninum og heimaflotanum. Tá okkara samlaða fiskiríkidømi helst ongantíð áður hevur verið so stórt sum nú, hava vit eitt gylt høvi at umfordeila okkara fiskiríkidømi soleiðis, at samstundis, sum vit taka fyrivarni fyri at geva fiskastovnunum tíð at vaksa seg stórar, so kann heimaflotin fáa onnur fiskirættindi.

Minnilutin tekur undir við metingunum hjá Havstovuni av Føroya Banka, men minnilutin mælir til, at Havstovan saman við vinnuni ger royndir á bankanum og øðrum friðaðum økjum. Hetta kundi verið gjørt við, at okkurt skip við eygleiðarum frá Havstovuni umborð ger royndartúrar. Slík skipan fer at skapa betri samljóð millum Havstovuna og vinnuna, og metir minnilutin, at tað er ein avgerandi fortreyt í framtíðar stovnsrøkt.

Veiðitrýstið, ið vinnan hevur á botnfiskastovnarnar undir Føroyum, er hóskandi til langtíðarjavn-vágina, sum ICES mælir til, men í løtuni mælir ICES til, at veiðitrýstið verður sett væl lægri fyri toska- og hýsustovnin, tí gýtingarstovnurin er so lítil og tí skal byggjast uppaftur eftir umsitingarætlanini. Ein partur av umsitingarætlanini er tillagingarskipanin, sum skal nýtast, tá ið stovnarnir eru undir minstu ráðiligu stødd. Havstovan nýtir hesa tillagingarreglu sum grundarlag undir sínum tilmæli í ár.

Minnilutin metir, at tvídrátturin millum vinnuna øðrumegin og Havstovuna hinumegin um ávirkanina av ovurstóru makrelnøgdini í føroyskum sjógvi eigur at verða greinað nærri, og mælir tí landsstýrismanninum til at skipa eitt greiningararbeiði, hvørs endamál er at fáa greiði á, hvørji páhald eru best grundað ella sonn, og har fiskivinnan verður ein aktivur partur av greiningar-arbeiðinum.

Tá niðurskurðurin av fiskidøgunum varð samtyktur í 2011, var ein grundleggjandi fortreyt, at lóg um brúksskyldu kom at virka, ið áleggur teimum, sum fáa fiskiloyvi, at brúka fiskiloyvi, Ein brúksskylda kann geva teimum, sum eru virkin í fiskivinnuni betri umstøður, sum frá líður. Verða óbrúktu fiskidagarnir aftur aktivur, tá botnfiskastovnarnir koma fyri seg, viðførir tað ein vanda fyri, at flotin verður ov stórur, og veiðitrýstið harvið ov stórt. Somuleiðis vil ein brúksskylda hava við sær, at tann parturin av flotanum, sum brúkar allar sínar dagar, fær atgongd til teir óbrúktu fiskidagarnar.

Minnilutin staðfestir, at av samlaða virðinum av føroyska fiskiríkidøminum er størri parturin uttan fyri fiskidagskipanina, sum er. Henda støða er ikki nøktandi, og tí er avgerandi neyðugt at fáa skipað nýggjar lógarkarmar kring føroyska fiskivinnu, sum fevnir um øll okkara fiskirættindi, heima sum úti.

Út frá eini heildarmeting av teimum náttúrufyribrigdum, sum eru í føroyskum sjógvi í løtuni viðvíkjandi makreli og sild v.m., og tí vánaligu støðu, sum toska- og hýsustovnarnir eru í, mælir minnilutin til ein niðurskurð av teimum tillutaðu døgunum innan ávísar skipabólkar. Einki er at ivast í, at tilmælið kundi verið avgjørdari, men velur minnilutin ikki at ganga frá breiðu semjuni, sum upprunaliga varð gjørd í Vinnunevndini.

Útróðrarflotin í bólki 5A og 5B er minkaður niður í nærum einki. Í tilmæli minnilutans verður dagatalið hjá hesum bólki tí óbroytt. Ein skerjing ger lítlan mun í mun til veiðitrýstið. Í bólki 4A eru bert fá skip virkin, tey fiskaðu í fjør einans 146 tons av toski, og hava tey í dag fáar fiskidagar. Harumframt hava tey lítlar møguleikar at ogna sær fleiri fiskidagar. Tí verður mælt frá at skerja hjá hesum bólkinum.

Minnilutin mælir tí til soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1, nr. 2 verður «4626» broytt til: «4441», «2567» broytt til: «2362», «1533» broytt til: «1410» og «1386» broytt til: «1275»

**Viðmerkingar**
Bólkur 2 verður skorin við 4% á innaru leið, og bólkur 3, 4B og 4T við 8%, ímeðan fiskidagatalið hjá bólki 4A og bólki 5 verður óbroytt.

**Vinnunevndin, 9. august 2013**

| | | |
|---|---|---|
| Alfred Olsen<br>formaður | Páll á Reynatúgvu<br>næstformaður | Jógvan Skorheim |
| Aksel V. Johannesen | Hanus Samró | Elsebeth M. Gunnleygsdóttur |
| | Janus Rein | |